# – Eg renni ikki undan Supertramp

– Eg njóti at fara á konsertferð, og eg eri sera fegin um, at eg fái møguleikan at vitja í Føroyum, sigur Roger Hogdson, fyrrverandi høvuðsmaður í Supertramp. Í summar kemur hann til Føroya at spæla á konsert fyri fyrstu ferð, og hann ætlar sær at spæla allar teir kendu sangirnar, sum hann skrivaði til Supertramp



– Eg eri sera spentur at koma til Føroya. Eg elski at vitja nýggj støð, og tá eg fekk innbjóðingina úr Føroyum, svaraði eg beinanvegin ja, sigur Roger Hodgson, sum skal spæla á Summar Festivalinum í august

SAMRØÐA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann eigur eyðkendu røddina í bólkinum Supertramp. Hann skrivaði stóru hittini, sum gjørdi bólkin til ein tann størsta poppbólkinum í heiminum eitt skifti seint í sjeytiárunum og tíðliga í áttatiárunum. Og í summar kann Roger Hogdson fyri fyrstu ferð upplivast á føroyskum palli, tá hann fer at spæla á Summar Festivalinum.

– Eg eri sera spentur at koma til Føroya. Eg elski at vitja nýggj støð, og tá eg fekk innbjóðingina úr Føroyum, svaraði eg beinanvegin ja. Eg skuldi ikki umhugsa meg leingi fyri at taka av tilboðnum. Tað var faktiskt eitt deiligt yvirraskilsi at fáa eina innbjóðing úr Føroyum, sigur Roger Hodgson.

Hann fer at spæla leygarkvøldið á Summar Festivalinum, og tá fer hann at syngja allar teir kendu Supertramp-sangirnar, sum fólk kenna so væl.

– Eg havi havt ymsar framførslur seinastu árini. Summar hava verið við bólki, onkuntíð havi eg havt strúkarar afturat, og uppaftur onkuntíð havi eg spælt mest sum einsamallur. Í Føroyum fari eg at hava eina soloframførslu, og eg havi saxofonspælaran hjá mær við. Hesar framførslur eru heilt serligar fyri meg, tí eg fái eitt sera tætt samband við áhoyrararnar, og eg kann veruliga syngja sangirnar, soleiðis sum eg vil hava teir at ljóða, sigur Roger Hodgson.

## Gavst á toppinum

Give A Little Bit, Logical Song, Breakfast In America, Dreamer og It's Raining Again.

Eyðkendu poppsangirnir hjá Supertramp gjørdu bólkin til ein tann størsta poppbólkin í heiminum eitt skifti síðst í 70'unum og fyrst í 80'unum. Útgávan Breakfast In America varð best seljandi útgávan í heiminum í 1979, og útgávan hevur higartil selt 18 milliónir eintøk.

Supertramp herjaði um hetta mundið hitlistarnar við sínum framúr góðu poppsangum, og bólkurin hevur samanlagt selt fleiri enn 50 milliónir plátur kring heimin.

Maðurin, sum skrivaði og sang flestu av hittunum hjá Supertramp, er Roger Hodgson. Hann er sangarin við teirri eyðkendu og høgu røddini, sum myndaði Supertramp í stórtíðini hjá bólkinum.

Best sum Supertramp var í hæddini fyrst í 80'unum, valdi Hodgson at gevast. Útgávan Famous Last Words frá 1982 gjørdist tann seinasta við honum í Supertramp, og árið eftir gavst hann í bólkinum.

## Rennur ikki undan Supertramp

Hóast Roger Hodgson ikki hevur spælt í Supertramp í meira enn 20 ár, verður hann í allar tíðir óloysiliga bundin saman við frálíka poppbólkin, har hann var høvuðsmaður.

– Tað var eingin løtt avgerð at taka, tí Supertramp hevði havt so nógv at siga fyri meg og var knýtt so tætt at mínum samleika. Men eg haldi, at bólkurin var komin so langt, sum hann kundi koma, tí eg valdi at gevast.

– Eg renni ikki undan Supertramp, tí tað kann eg als ikki. Mín rødd og mín tónleikur var ein so týðandi partur av bólkinum, at tá fólk hoyra meg syngja nú, so seta tey meg sjálvsagt í samband við Supertramp. Tað havi eg einki ímóti, tí Supertramp hevði sera nógv at siga fyri meg í nógv ár, og bólkurin gjørdist ein partur av mær, sum eg ikki kann sleppa undan, sigur hann.

– Tað fara fólk eisini at hoyra á konsertini í Føroyum, tí eg spæli framvegis mínar sangir frá tíðini í Supertramp. Sangirnir eru framvegis míni børn, sum eg eri góður við. Mær dámar væl at syngja sangir, hóast tað eru nógv ár, síðani eg gavst í Supertramp, sigur Roger Hodgson.

## Hugsaði um familjuna

Ein týðandi orsøk til, at Roger Hodgson valdi at gevast í Supertramp var, at hann vildi brúka tíðina til annað enn tónleik og Supertramp.

– Eg helt, at tað var rætt at gevast í Supertramp, tí í eini 14 ár hevði eg brúkt meginpartin av mínari tíð upp á bólkin. Eg vildi seta meira tíð av til familjuna hjá mær, og tí gavst eg heilt í bólkinum. Tað kendist rætt tá, og eg havi ikki angrað tað síðani, sigur Roger Hodgson.

– Næstu árini brúkti eg tíðina til familjuna og at finna meg sjálvan. Tað var trupult at verða burtur frá tónleikinum, og tað var ein stór broyting í mínum lívi. Tað var ikki bara lætt, men eg fekk nógv burtur úr hesum árunum.

Roger Hodgson hevur altíð verið hugsandi maður, og hann hevur brúkt nógv tíð til at finna seg sjálvan og eydnuna í lívinum.

– Eg havi altíð grundað yvir stórar spurningar. Eg var rættiliga forvirraður í mínum ungdómsárum og hevði nógvar spurningar til mín sjálvan, sum eg ikki dugdi at svara. Eg leitaði eftir eydnu og kærleika, og tað sást aftur í mínum sangum.

– Nú eri eg væl eldri, eg havi verið ígjøgnum nógv, og eg havi eisini nógv svar, sum gera meg meira eydnusaman. Seinastu árini havi eg aftur fingið hugin til at spæla tónleik, og tí havi eg spælt konsertir kring allan heimin. Eg njóti at fara á konsertferð, og eg eri sera fegin um, at eg fái møguleikan at vitja í Føroyum, sigur Roger Hogdson.